

## Vinokourov ger comeback

Alexandre Vinokourov staðfestir nú, at hann eftir øllum at døma fer at gera comeback í súkkling seinast í juli-mánaða. Tá er leikbannið, sum hann fekk fyri tveimum árum síðan fyri at nýta rúsevni, ikki galdandi longur. – Eg fari ikki at umboða annað lið enn Astana. Felagið varð stovna í 2006 av okkara samgongu, og tað er sum eitt barn fyri meg, sigur Alexandre Vinokourov við altjóða fjølmiðlar.

## Rommedahl hevur møguleikan

Dennis Rommedahl vónar framvegis, at hann heldur fram í Ajax. Hann sat í farna kappingarári fyri tað mesta á beinkinum, og í januar gjørdi hann leiguavtalu við NEC Nijmegen. Nú er hann aftur í Ajax og ætlar at stríðast fyri sínum plássi. – Allir fáa møguleikan, og eg havi ikki hoyrt nakað. Vit eru 33, sum venja við í løtuni, so eg fari at gera mítt, sigur Dennis Rommedahl, sum vónar at hann sleppur at halda fram, við Tv2 Sporten.

# Annika lyftir arvin

**Eru Sigrid og Schandorff Vang ávíkavist drotning og kongur innan føroyska bogaskjóting, er eingin vandi fyri, at prinsessan ikki lyftir arvin**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Hon gjørdi tað aftur. Týsdagin togaði Annika Vang ótrúlig 30 stig aftur á 30 og metrum. Og mikudagin vann hon gull í face-to-face kappingini, har skjúttarnir kappast tveir og tveir við 12 pílum í part.

Umframt vanligt hegni at skjóta, so krevur hendan kappingargreinin meira enn nakað ein veldugan part av ítróttarsálarfrøði.

Norski guru'in innan økið, Willi Railo, skrivaði á sinni bókina, Bedst nær det gælder, og kanska hevur Annika kagað leysliga í hesa.

Í øllum førum prógvaði hon bæði í fyrradagin og í gjár, at hon veruliga hevur evnið til at sveiggja seg upp til tað sublima, tá mest stendur á.

Og tá seinasti ørvurin í uppgerðini móti Anu Sinikka Vassiliadis av Rhodos skuldi skjótast, var hetta eitt skúladømi um, hvussu tú ert best, tá mest stendur á. Fyri tveimum árum síðani vann Anu somu kapping, men hesa ferð var Annika sterkari undir trýsti.

Konsentratiónin var av slíkum slag, at áskoðararnir mest sum føldu, hvussu Annika kroysti alla ytru ávirkan burtur, áðrenn hon fór undir skjótingina. Og tá skjúttarnir vóru lidnir, og sigurin staðfestir, fall føroyska prinsessan innan bogaskjóting á knæ. Og tað gingu minuttir við tárum, klemmum og mussum, áðrenn tað eydnaðist okkum at fáa orð á hana.

- Hetta er fantastiskt. Eg visti, at eg mátti skjóta upp til mítt allarbesta, og tað gjørdi eg. 70 meturin er kanska tann veikasti parturin í mínari skjóting, men hesa ferð kláraði eg tað. Eg skeyt mín besta 70 metur nakrantíð, og tað var neyðugt, um eg skuldi vinna. Í hálvfinaluni skeyt eg 89 stig, men hesa ferð var talið 98, so beint nú eri eg bara ovur-ovur-fegin, staðfesti Annika Vang, tá sigurin var heima.

Og talan er veruliga um rimmar sigur. Við hesum hevur Annika nú skotið seg til gull í einstaklingakappingini – bæði í FITA-rundu og face-to-face. Prinsessan er vorðin ein drotning.

## FAKTA

**Face-t-face føroysku úrslitini**

**Recurve, kvinnur**
Annika Vang, gull
Jastrid Maria Rein Jensen, tapti 1/8-finalu

**Recurve, menn**
Absalon Hansen, silvur
Hans Petur Højgaard, 4. pláss
Eirikur í Jákupsstovu, tapti 1/16-finalu
Jógvan Magnus Andreasen, tapti 1/16-finalu

**Compound, kvinnur**
Rakul Dam, 4. pláss
Sigrid Vang, tapti 1/4-finalu

**Compound, menn**
Albert Eliase Dam, tapti 1/4-finalu
Hans Asbjørn Eysturdal, tapti 1/4-finalu
Magnus Andreasen, tapti 1/4-finalu




Annika Vang vann mikudagin sítt triðja gullmerki. Hesa ferð í face-to-face, sum hon ikki hevur vunnið gull í áður
Mynd: Álvur Haraldsen

## Jógvan var ískaldur

**Tað var eingin slingur í valsinum. Triðju oyggjaleikirnar á rað vann Jógvan Niclasen compound-kappingina í head-to-head**

**Verður tosað um doping innan bogaskjóting, er ofta aloftast, tí íðkarar hava nýtt metadon, ið mest sum doyvir nervarnar, sum annars kunnu vera upp til eina kapping.**

**Og verður hugt at kappingum í face-to-face skjóting, so er eisini skilligt, at eitt sindur av nervastillandi heilivági kann vera freistandi. Í øllum førum um tú ert ein av teimum, sum ristist á hondunum, tá mest stendur á. Men soleiðis er ikki við Jógvani Niclasen. Teir báðar seinastu oyggjaleikirnar hevur Jógvan skotið seg til gull í bæði FITA-rundu og face-to-face. Týsdagin varð hann eitt stig ov stuttur til at endurvinna FITA-runduna, men í gjár beyð ikki bøtur.**

**Jógvan var snøgt sagt ísakaldur, tá mest stóð á í finaluskjótingini. Móti Ametller Taltavull av Mernorca legði Jógvan seg alt fyri eitt á odda, og so helt hann bara fast um og útbygdi munin, sum at enda gjørdist seks stig.**

**-mørk**